# ði okkum undan vanlukkuni



– Tað hevði verið rættiliga illa vorðið hjá okkum trimum í bilinum hendan dagin, um vit ikki øll sótu væl íbundin. Ilt er at siga, hvussu eg sjálvur hevði komið burtur úr hesum. Í besta føri hevði eg brotið meg sundur, og óhugsandi er ikki, at Hjørdis hevði verið slongd fram ígjøgnum rútin. Hvat hevði hent Harandi, um hann ikki sat í stóli og væl íbundin, tori eg slett ikki at gera mær nakrar tankar um, sigur Hendrik Egholm

Mynd: Jens Kr. Vang



– Tað fóru nógvir tankar gjøgnum høvdið á mær, til bilurin steðgaði aftur á breytini. Sekundini kendust long – og eg hugsaði í fyrsta lagi um tey bæði, sum aftanfyri vóru. Tað "melur" skjótt - og nógv - undir slíkum umstøðum, ásannar Hendrik Egholm

Mynd: Jens Kr. Vang

andi likamligt mein av tilburðinum.

## Pínan kom seinni

– Hjørdis hevði – og hevur enn – blá merkir á kroppinum av seðlunum, og eg havi havt ilt í beinum, knøum og ørmum.

Hendrik heldur, at airbaggið í róðrinum gjørdi, at hann ikki fekk nøkur serlig merkir av seðlunum, men í staðin boygdi airbaggið brillurnar, eins tað trýsti armarnar til síðis.

– Eg bløddi eitt sindur í øðrum arminum, helst av brotna rútinum, men tað hevði ikki nógv upp á seg. Sum seinnaparturin leið, hevði eg ilt ymsastaðni í kroppinum, og eg hevði eisini ógvuliga ilt í knøunum.

Hann sigur, at Hjørdis ber framvegis merkir av trygdarseðlunum, og sjálvur hevur hann ilt ymsastaðni i kroppinum enn.

– Lítli sonur okkara hevur onkur smávegis blá merki, har seðlin hevur ligið um.

## Langur grátur

Hendrik sigur, at tey bæði tóku so hjartaliga synd í dreinginum, sum græt illa eftir tilburðin. Tá ið kanningarnar vóru lidnar, blíðkaðist hann og kundi aftur smílast, eisini til starvsfólkið á sjúkrahúsinum.

– Vit vóru hjá honum alla tíðina, eisini meðan vit vóru til kanningar á Landssjúkrahúsinum. Drongurin vildi bara vera hjá okkum. Tá ið pápi mín kom, smítist lítli Harald til hansara, men hann vildi beinanvegin aftur til okkum.

Hann vísir á, at eitt var ógvusliga hendingin í bilinum – og annað var, at drongurin undir hesum umstøðum varð tikin út úr bilinum av manni, hann ikki kendi. Haraftrat vóru nógv fremmand fólk á Landssjúkrahúsinum, sum kannaðu dreingin.

– Øll vóru blíð og fyrikomandi, og soleiðis mátti tað bara vera.

Hendrik heldur tó, at drongurin hevur tað hampiliga gott nú nakrar dagar eftir hendingina.

## Altíð í seðlum

– Eg trúgvi, at tað hevði verið rættiliga illa vorðið hjá okkum trimum í tunlinum hendan dagin, um vit ikki øll sótu væl íbundin. Ilt er at siga, hvussu eg sjálvur hevði komið burtur úr hesum. Í besta føri hevði eg brotið meg sundur, og óhugsandi er ikki, at Hjørdis hevði verið slongd fram ígjøgnum rútin. Hvat hevði hent soninum, um hann ikki sat í stóli og væl íbundin, tori eg slett ikki at gera mær nakrar tankar um.

Hendrik leggur dent á, at tey altíð sita í trygdarbelti, tá ið tey eru í bili, og hendingin sunnudagin ger, at tey ongantíð fara at ivast í, at hetta er besta trygdin, um illa vil til.

Men hvussu hava tey so havt tað sálarliga síðan tilburðin sunnudagin?

– Vit hava tosað nokso nógv um tað, sum hendi, og eg vil siga, at tað nú gongur hampiligt. Lagið hevur tó verið eitt sindur upp og niður.

## Sálarhjálp

Hendrik viðgongur, at hann hevur verið ein túr hjá sálarfrøðingi, har tosað hevur verið um hendingina, og hann heldur, at hetta hevur verið gevandi.

– Tá ið vit dagin eftir fóru suður aftur til Sands, vildi eg sjálvur sleppa at koyra, og eg havi eisini verið onkran túr aftur, síðan vit komu suður aftur. Eg haldi, at tað gongur hampiligt, hóast skelkurin enn situr í, sigur Hendrik Egholm at enda.